SAMBAND YNSKIST
Til tín, ið var í dansi í Kollafirði leygardagin 27. sept. Tú siglir úti, og eg veit tú er einsamallur í dag. Eg vildi fegin, at tú skrivaði mær nakrar reglur, og tú skuldi fingið ein trúgvan vin fyri lívið, og annars ikki verið skuffaður á nakran hátt, tá vit síggjast. Skriva til Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn
Bill. mrk. 1381/e

VIL TÚ BLÍVA MAMMA?
Eg vil gjarna blíva pápi, tí eg eigi einki barn – eri trúgvandi, royki og drekki ikki. Lat okkum liva saman og helst giftast, eg vóni tú svarar. Skriva til Sosialurin, box 76, 110 Tórshavn.
Bill.mrk. 1682/1

Sjavs

SJAVSKAPPING
Almenn sjavskapping verður á Kafé Blákross týsdagin 7. okt. kl. 19.00
Kafé Blákross

SJAVSKAPPING
á Strondum sunnudagin 5. okt. kl. 16. Spælt verður nú um ein Apex ferðaseðil við Maersk til Danmarkar, sum verður drigin fyri jól
Strálan

Súkklur

TIL SØLU
Ein Aprillia RS50.
Tlf. 253223

SKUTARI YNSKIST
til keyps, max 5.000,- kr. Hann skal hava plátur.
Tlf. 510153 eftir kl. 17

KNALLERT YNSKIST TIL KEYP
Helst í góðum standi. Vinarliga ring
tlf. 372071/258438

YNSKIST
Ein dreingjasúkkla til 10-12 ára gamlan drong við uml. 21 gearum.
Tlf. 514797

MOTORSÚKKLA TIL SØLU
Yamaha FJ 1200, árg. 1991, prísur 67.000 kr.
Tlf. 424407

TIL SØLU
ein Aprillia RS 50
Tlf. 422331

TIL SØLU
Kreidler skutari, 3 ár, koyrt 5.000 km við lítlum breki. Til sølu fyri 5.000 kr.
Tlf. 228347

MINIBANACROSS
Ein minibanacross til sølu fyri 9.000,- Koyrir ikki, men krevur lítið av ábøtum. Hon er 80 cc.
Tlf. 226880

DAMUSÚKKLA TIL SØLU
Winther kvalitetssúkkla v/ 3 kervum til sølu. Í góðum standi. Nýprísur: 3.200 kr. til sølu fyri 1.000 kr.
Tlf. 321214 ella 211214

TIL SØLU
2 Puch Monza til sølu. Onnur fyri 3.000 kr. og hin fyri 4.000 kr. Nógvir deilir fylgja við.
Tlf. 210104

YNSKIST
Ein Aprilia RS 50cc fyri uml. 12.000 kr. Skal vera frá 98. Er í góðum standi. Ring
Tlf. 270255 ella 441635

Teldur

XBOX SPØL
Fifa Football 2003 kr. 400,- NBA kurvaboltur 2003 kr. 400,- WW Raw (wrestling) kr. 300,- Nýprísur pr. stk. ca. 600,-
Tlf. 448106

TIL SØLU
+2000 mhz athlon Processor, 512 mb Ram, 80 Gb harddisk, Ge-force 4 Graffikkort, innbygt modem, 48x24x48 brennara, dvd-drev, 17" flatskerm, tráðleyst tastatur og mús, windows xp við øllum tilhoyri, spøl. Nýprísur 14.000 kr.
Ringið á tlf. 509669 um tit eru áhugað

TIL SØLU
AMD+2200 við 256 RAM, 80 GB, GeForce 4 við 64 MB, 56K Modem, DVD/CD-Rom, netkort 10/100, 17" skerm, mús/knappaborð, 2 hátalarar + woofer, spøl og annað tilhoyr. Til sølu fyri 6.000 kr.
Tlf. 229379

TIL SØLU
Pirates of Caribbean,
American Conquest,
Wolfenstein,
Praetorians,
Cossacks,
Medieval/Shogun total war,
Delta Force, Age of Empires,
Commandos 2, + 10 spøl, nýggjur brennari 48x24x48. Alt fyri bert 1500 kr.
Ringið 214500

TIL SØLU
Eitt playstation I v/ 2 joystikkum. Eitt Sega master system II við 2 spølum at seta til sjónvarp.
Tlf. 514797

ÓBRÚKT TELDA
við ymiskum tilhoyri til sølu fyri 5.000,-
Tlf. 212405

WORKSTATION!
Hewlett Packard XW6000. 2.8 Ghz P4 Xeon – 1024 ECC DDR RAM (synkroniseraði) møguleika fyri 2 processarum. 36,4 GB SCSI HD + 120 GB IDE 133 HD. Radeon 9200 128 mb skermkort – DVD – 52x24x52x brennara – sub + 4 hátalara – win XP 17" HP skerm. 4 mánar gomul. Nýprísur í dag uml. 30.000 kr. Boð undir 20.000 ongan áhuga.
Tlf. 214487

PRINTARI TIL SØLU
HP Deskjet 3420 við USB-kaðali. Í óopnaðum orginal innpakningi. 10 síður/min. s/h, 8 síður/min. lit. Kann printa foto kvalitet. Prísur kr. 799,-
Tlf. 322590/219590

TELDA TIL SØLU
Ein AMD Atlon (TM) processor 1.15 GHz 512 MB Ram, Windows XP Home Edition, 17" skerm, tráðleys mús, Epson lit printari, hátalarar við subwoofara, ómetaliga góð og skjót telda fyri 8.500 kr. Ring og hoyr nærri.
Tlf. 722978 ella 422978

TELDA TIL SØLU
AMD XP 2100+, 512 MB Ram, Creative Audigy Player ljóðkort, Asus GeForce4, T14400 Grafikkort, 120 GB Harddisk, CD brennara, Thermaltake Xaser II kabinett. Uttan skerm. Sí www.sokka.net/telda Til sølu fyri 6000 kr.
Tlf. 229533

GÓÐ TELDA
1300 MHz, 640 MB ram, 120 GB, Geforce FX 128 DDR Ram, Combodrev, 17" skermur, mús, keyboard, hátalarar, umleið kr. 10.000,-
Tlf. 220127

IETT PLAYSTATION 2
við tveimum spølum og einum memorykorti til sølu.
Tlf. 321591

TIL SØLU
Telda 1600 MHz, 40GB, 256 Ram, Philips skermur 19'', Geforce 2 64 MB, CD/DVD + brennara, 4 hátalarar + Subwoofer + nøkur spøl, uml. 6.000 kr.
Tlf. 315717 eftir kl. 18.00

Tónleikur

FLYGEL TIL SØLU
Enskt flygel av merkinum Chappell. Longd 165 cm. Kom og royn tað.
Ring 312075 ella 556042

TIL SØLU
E-V hátalarasett 600 watt sub og 400 watt toppar.
Tlf. 504341/255569

BILSTEREO
Eitt hálvt ára gamalt kompl. bilstereo verður selt fyri hálvan pris. Ring og hoyr nærri.
Tlf. 211777

ER TAÐ NAKAR
sum hevur eitt brúkt klaver til sølu, helst hvitt.
Tlf. 263817

YAMAHA AW4416 TIL SØLU
AW4416 er flaggskipið innan harddisk, recordarar. 24 spor, allar droymandi effektir, innbygdan fløgubrennara, óbrúktur, til sølu fyri 17.500,- Nýprísur 25.000,-
Tlf. 515318

EL-KLAVER YNSKIST
fyri sámuligan pris.
Tlf. 441040 eftir kl. 18.00

Út- & Sjónvarp

SJÓNVARP YNSKIST
Eitt sjónvarp/video 20" ynskist bíliga til keyps.
Tlf. 514797

42'' PLASMA SKERMUR
Av slagnum Panasonic og Panasonic DVD, spildurnýtt til sølu.
Tlf. 210346

SJÓNVARP TIL SØLU
Eitt nýtt 21" Panasonic til sølu fyri kr. 4.000 ella hægsta boð yvir.
Tlf. 507997

PARABOL TIL SØLU
Digital parabol (Strong) skál, stativ og móttakari til sølu fyri 3.000 kr.
Tlf. 448097 ella 748097

TIL SØLU
Sony 29" sjónvarp til sølu fyri 3000 kr.
Tlf. 421059

SAMSUNG RADIO
við dupultum bandspælara 800 kr.
Tlf. 316649 eftir kl. 18

KENWOOD DVD-SPÆLARI
til sølu. DVF-5020, 1 ár. Nýprísur 6.490 kr., til sølu fyri 4.000 kr.
Tlf. 757514

Ymiskt

TIL DANMARKAR
Er tað nakar, ið vil ferðast saman við mær til Danmarkar 25. okt. og uppaftur til Føroyar 29. okt. so ring til mín.
Tlf. 449130 ella 449903

YNSKIST TIL KEYP
Rottangi/septiktangi ynskist til keyps.
Tlf. 443017

FRÁ VÍF
Ársveitslan verður leygardagin 8. november 2003 kl. 19.00 í ítróttarhøllini.
VÍF

TIL SØLU
Panasonic fartelefon til sølu fyri kr. 300,-
Tlf. 316817/516817

TIL SØLU
Studio mix pultur, 16 kanal, 8 suff. Ring og fá meira og vita
tlf. 504341/255569

TIL SØLU
400 watt Jamo hátalarar, 2 stk. 16 kanal stage kápul 30 m. 24 kanal stage kápul 30 m.
Tlf. 504341/255569

MAHOGNY VINDEYGU
Eitt nýtt mahogny vindeyga 149 x 149 cm. deilt í 9 lágorkurútar 45 x 45 – 2 at lata upp. Vælegnað til smærri broyting á húsafasadu ella at seta í staðin fyri garaguhurð. Til sølu fyri 6.000,-
Tlf. 224803

GARAGUHURÐAR
Vegna feilkeyp eru 2 el garaguhurðar 3 x 3 m til sølu.
Tlf. 229171/227474

GERIÐ KVETTI
Motorola T140 fartelefon til sølu fyri 1.500,- kr. Óbrúkt og óútpakka. Vanligur prísur er 2.000,-
Tlf. 220333, Rannvá

GRUNDSTYKKI
Grundstykki í Vági – við Toftaryggir til sølu.
Tlf. 373098

SONY ERICSSON T600
Ein tann minsta fartelefonin í heiminum. Hon vigar bara 60 gr. Hevur vibrator, spøl, kalendara, EMS, WAP og meira. Hon er bert 4 vikur gomul. Til sølu fyri einans 1.200 kr. send ein mail til:
kd@post.olivant.fo

FERÐ VIÐ NORRØNU
2 fyri 1 við Norrønu í heystferiuni! Ert tú konufólk, ið skal niður einsamøll uttan bil tann 9. oktober og uppaftur 18. oktober? Tú fært billett fyri 1000,- um tú ferðast saman vid mær. Ring nú!
Anki 214433

VENJINGARBONKUR TIL SØLU
Bonkur við 2 stongum + 2 hondvektir við tilsamans ca. 70 kg. Selist samlað fyri 1500 kr.
Tlf. 315167

TIL SØLU
Siemens C45 við tasku og oyrasnigli til sølu fyri 600 kr.
Tlf. 533491

TIL SØLU
Ein dupultur radiatorur l. 300 cm. x b. 30 cm. til sølu fyri 800 kr.
Tlf. 225014

PLASTVINDEYGU
Fabriksnýggj plastvindeygu til sølu 120 x 120.
Tlf. 219400

BALLUR
ca. 70 grasballur á 50 kg. til sølu.
Tlf. 422243/226193/422178

STÓRT TILTAK
verður í Studentaskúlanum í Hoydølum 4. okt. Millum annað verður loppumarknaður, har moguleiki verður at keypa bøkur, møblar og mangt annað sera bíliga. Eisini verður café, bílvask og nógv góð barnatiltok.
Lívfrøði hástig

HUGNAKVØLD
verður í Eydnuni á Oyrarbakka mánadagin 6. okt. kl. 19.00. Bussarnir koyra sum vanligt.
Sunda Pensiónistafelag

EIGUR TÚ
eina brúkta kjallaraúthurð std. 89/198 cm.
Ring 254866

FLETTIBORÐ
Tey vælumtóktu flettiborðini fyri bert 490 kr. fáast framvegis. Verða send um alt landið.
Tlf. 213695

TÓRA OG VALDEMAR
sakna dvørgakanin teirra, ið er rýmd úr Tvørgøtu. Kaninin er grá og hevur hangioyru. Hevur tú sæð ella funnið hana, vinarliga ring
tlf. 553355

GÓÐ URTAGARÐSMOLD!
Góð urtagarðsmold fæst!
Ring á tlf. 218328

FARTELEFON YNSKIST
Søkt verður eftir einari bíligari fartelefon, sum skal vera í góðum standi. vinarliga ring á tlf 220405 ella í arbeistíð á tlf 350519.
Tlf. 220405

TIL SØLU
Uppladari til Ericsson 626, óbrúkt, við antennu, til sølu fyri 100 kr. + frakt. SMS chatboard, óbrúkt til Nokia 51xx og 61xx model, góð til m.a. SMS, telefonbók v.m. fyri 150 kr. + frakt.
Tlf. 0045 86428627/0045 26747474 (eisini SMS)

SØLUFRAMSÝNING
Gallerí Vágsbotn fer at hava stóra sølframtsýning í SMS 6. til 11. okt.
Gallerí Vágsbotn, tlf. 314293/214293

NÝTT ÚTHÚS SELIST
Stødd: (LxB) 3m x 2,5m. Høg reising, Kann uttan hóvasták flytast í heilum líki. Kostnaður kr. 20.000.
Tlf. 320133 eftir kl.17.00

TIL SØLU
Tveir hitablásara av slagnum Melissa 2000W, 2 ára gamlir, men ikki brúktkir 200,00 kr. pr. stk (Nýprísur 348,00 pr.stk)
Tlf. 310039 eftir kl. 18:00

Minningarorð um
Ólav Nielsen
Sandavágur

f. 26. juli 1963 - d. 2. sept. 2003

Nú er gott og væl ein mánaði farin, síðani tey óvæntaðu og syrgiligu boð komu tann 2. september at ein starvsfelagi gjøgnum nógv ár, Ólavur Nielsen, var farin, bert 40 ára gamal. Bert fáar dagar áðrenn Ólavur aftur skuldi á skipsdekk saman við starvsfeløgum og vinum sínum, var seinasti sjógvurin rógvin, og árarnar vóru lagdar inn.

Ólavur var yngstur av 6 børnum hjá Bodil og Hans Nielsen, og sleit hann sínar barnaskógvar í heiminum mitt í Sandavágs bygd við Stórá sum nærmasta granna. Og Ólavur bleiv eisini búgvandi í barnaheimi sínum, har hann var móðir síni ein stórur stuðul, eftir at Hans doyði, eisini á ov ungum árum.

Vit komu at kenna Ólav einabest sum starvsfelaga umborð á "Høgafossi", har Ólavur hevur starvast í nógv ár. Ólavur var ein friðarligur maður, og ein góður starvsfelagi sum onki hóvasták gjørdi burturúr sær og sínum arbeiði. Og hann var raskur, álítandi og trúðfastur sum fáur, og tí eisini væl dámdur av starvsfeløgunum. Eitt gott dømi um hvussu væl dámdur Ólavur var av sínum starvsfeløgum, var, tá ein lutfalsliga nýggjur av manningini, sum hevði verið saman við Ólavi ein túr frammanudan, nakað síðani fekk skipsboð. Hann spurdi tá, um Ólavur eisini skuldi við, og fekk at vita at tað skuldi hann. Hann segði tá, at honum dámdi so ómetaliga væl at arbeiða saman við Ólavi, tí hann var altíð til reiðar at hjálpa og var so lættur at umgangast í allar mátar. "Ja, eg gleði meg faktist at fara aftur til skips saman við Ólavi", vóru orðini hjá hesum starvsfelaganum, bert stutta tíð áðrenn Ólavur andaðist. Tað unnist ikki hvørjum manni at fáa slíkt skoðsmál frá sínum starvsfeløgum.

Tónleikurin fylti nógv í lívinum hjá Ólavi. Sum ungur spældi hann í orkestri, og spældi mangan til dans í bygdunum í Vágum saman við øðrum. Og tá hann var heima var hann javnan saman við vinfólki og spældi tónleik. Hesin áhugi fyri tónleikinum fylgdi eisini Ólavi tá hann var til skips, tí hann hevði altíð bond, fløgur og avspælarar við sær til skips, og lurtaði íðin í síni frítíð eftir tónleikinum. Ólavur hevði eisini áhugað fyri øðrum menniskum og øðrum umhvørvum. Mangan, tá skipið fór inn at skifta manning í Canada, stoðgaði hann á har, ella í Onglandi á sjálvari heimferðini í nakrar dagar, har hann ferðaðist runt og upplivdi hesi lond, og oftani eisini í Danmark, har hann vitjaði familju. Ólavur var eisini ein sera íðin frítíðarsúkklari - helst ein av teim ídnastu í landinum. Hann sást altíð á súkklu í Sandavági ella ávegis til Miðvágs at vitja familju og kenningar, tá hann var heima. Og hann hevði altíð súkklu við sær umborð, tá hann fór til skips og brúkti hana dúgliga, tá skipið kom inn í fremmanda havn, antin tað var í Danmark, Íslandi ella Canada.

Fyri móðir, systkin og familjuna annars er saknurin nú Ólavur er farin, stórur, og vit vóna, at tit finna ugga í øllum teim góðu minnunum um Ólav. Eisini fyri okkum, sum í nógv ár hava starvast saman við Ólavi, er saknurin stórur, og vit fara altíð at minnast Ólav sum tann friðarliga, raska og álítandi starvsfelaga hann var.

Við hesum orðum lýsa vit frið yvir minni um ein trúðfastan og góðan starvsfelaga.

Manning og reiðarí á "Høgafossi"

www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo

HEILSANIR

Góðu Torfinn og Guðrun
Hjartaliga tillukku við 8 og 1 ára føðingardøgunum. Eisini ein heilsa til Sverra. Alt tað besta.
Ynskja Anna Katrin gumma, Ann-Tordis, omma, mostir og gubbi

Góða omma og langomma
Vit øll ynskja tær hjartaliga tillukku við teimum 80 árunum. Takk fyri alt tú ert fyri okkum. Eisini ein heilsan til abba/langabba
Ynskja ommu- og langommubørnini

Góði Hans Harald
Hjartaliga tillukku við 3 ára degnum. Vit gleða okkum at koma í føðingardag.
Ynskja Bjørt og Djóni

Góða stórasystir
Hjartaliga tillukku við 40 ára degnum og nógv góð ár í framtíðini.
Heilsan lítlibeiggi, sum vantar á myndini

Góða Bryndis
Hjartaliga tillukku við 10 ára degnum.
Ynskja omma og abbi í Tjarnalág

Góða fitta Sólja
Hjartaliga tillukku við 2 ára føðingardegnum.
Ynskja mamma, babba og Teitur

Góði Teitur
Hjartaliga tillukku við 9 ára føðingardegnum og ein heilsan til Janus.
Heilsan vinur tín Jens Kristian

Hey góða S.M.M.
Tillukku við degnum 4. okt., og takk fyri samstarvið á hædd 8,6 og ikki at gloyma tær strævnu vaktirnar á hædd 5.
Heilsan hin starvsfelagin og 3 ferðir MUH

Góða fitta Jonnhild
Vit ynskja tær hjartaliga tillukku við 3 ára degnum.
Bestu heilsanir omma og abbi

Góða Katrin
Hjartaliga tillukku við teimum deiligum 30. Vælkomin í klubban. Vit ynskja tær alt tað besta.

Hesin fitti drongurin, ið eitur Julian, er 4 ár í dag 4. okt. Tillukku góði.
Mamma og babba

Ha ha, nú er tú eitt ár eldri. Vit koma fjølment í kvøld at minna teg á tað alla tíðina.
Heilsan »venindurnar«



Góði elskaði Týr
Hjartaliga tillukku við 1 ára føðingardegnum og øll góð ynskir fyri framtíðina.
Ynskja mamma, babba, Ronja og Oddvør

Góði elskaði Magnus
Hjartaliga tillukku við 18 ára degnum og vit gleða okkum til ballið í kvøld.
Ynskir familjan Johannesen

Heilsanir

30,- kr. Sosialurin

5 ferðir um vikuna

Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag. Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑Leygard.

Tekstur:.....
.....
.....
.....
.....
.....

Myndina aftur: Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.
Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: .....
Bústaður: .....
Bygd/býur: ..... Tlf.: .....

Sendið lepan, mynd og gjald til:
Sosialurin
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »**Heilsanir**«